Havnar Klubbi framum

Góðan møguleika at gerast føroyameistari í ár við hesi ferðini

Havnar Klubbi liggur nú á odda í føroyameistarakappingini í billard og hevur lagt verandi meistarar av Tvøroyri afturum seg. Tó er munurin ikki stórur. Bæði liðini eru jøvn í stigum. Tey hava 30 stig hvør, men Havnar Klubbi hevur næstan 1000 eygu fleiri.

Henda rættiliga kollveltandi broytingin í toppinum í 1. deild kom, tá Havnar Klubbi leygardagin spældi móti vágbingum. Vágbingar, sum eru rættiliga nýggir í billardkappingini, vóru rætt og slætt avsmurdir av havnarmonnum. Úrslitið bleiv 16-2 til Havnar Klubba, sum við hesum stórsigrinum hevur lagt seg á odda í kappingini. Hetta var væntandi, nú Havnar Klubbi hevur styrkt sítt lið við einum av okkara bestu billardspælarum, Steingrím Samuelsen úr Fuglafirði. Hann hevur fyrr spælt á liðnum hjá fuglfirðingum, men teir eru so ikki við í kappingini í ár.

Tað er tó fyrst og fremst tí gomlu billardkempuni Eirikki Nielsen, sum nú er raknað við aftur, fyri at takka, at Havnar Klubbi aftur er at finna fremst í billardkappingini. saman við Steingrími Samuelsen og Eli Zachariassen er hann nú við at føra Havnar Klubba móti einum FM-sigri. Hann var suverenur móti vágbingum og spældi seg til eitt meðal uppá 20,8. Havnar Klubbi fekk omanfyri 3000 eygu og næstan 17 í meðal móti vágbingum og er hetta nógv tað besta úrslitið í 1. deild í ár.

Havnar Klubbi bestu møguleikar

Fer Havnar Klubbi at spæla við hesi ferð í komandi dystum, so er einki at ivast í, at teir gerast føroyameistarar. Tað, sum er altavgerandi, er at hava eitt javnt gott lið og ikki bara ein ella tveir góðar spælarar. Júst henda sannroyndin kann fara at kosta tvøramonnum føroyameistaraheitið í ár, tí triði maðurin á liðnum er júst fluttur upp úr 2. deild og hevur tí ikki ta neyðugu venjingina og roynd-irnar at klára seg í avgerandi dystum móti frægum spælarum sum eitt nú Steingrím og Eli á Klubbaliðnum.

Taka vit eyguni, so siggja vit eisini, at Havnar Klubbi er klárt bestur. Hann hevur 6054 eygu fyri tvey umfør, meðan Mimir 1 hevur næstflest eygu, ialt 5560 og sum nummar trý í eygum kemur Tvøroyrar Klubbi við 5140 eygum, t.v.s. næstan 1000 eygum aftanfyri Havnar Klubba. Hetta sigur ikki so lítið um styrkina á liðnum hjá Havnar Klubba í ár og vísir, at teir liggja sera væl fyri.

Hóast fleiri eygu enn tvøramenn so er liðið hjá Mimi nr. 3, tí teir hava 6 stig færri. Hetta er ikki nógv, men kann vera sera torført at innheinta í síðsta enda. Á einum fjórða plássi liggur hitt liðið hjá Mimi við 16 stigum. Nummar fimm er Marinustøðin við 12 stigum, nummar seks er Klaksvíkar Klubbi við 10 stigum og aftastur er Vágs Klubbi við 4 stigum.

18—0 til 2. deild

Ein dystur hevur verið í 2. deild millum Klaksvíkar Klubba og Havnar Klubba 1. Havnar Klubbi vann við 10-8. Besti maður í hesum dystinum var Hans Jørn Nielsen úr Havnar Klubba. Ein dystur hevur eisini verið millum Mimir 1 og Vágs Klubba. Mimir vann henda dystin við 18-0. Besti maður var Jákup Hjaltalin úr Mimi við umleið 11 í meðal. Støðan í 2. deild er tann, at Mimir 1 liggur á odda við 36 stigum, nummar tvey er Havnar Klubbi 1 við 32 stigum, nummar 3 er Havnar Klubbi 2 við 24 stigum, nr. fýra er Klaksvíkar Klubbi við 22 stigum, nr. fimm, seks og sjey eru Kaggin og Tvøroyrar Klubbi 2 og Mimir 2 við hvør sínum 4 stigum og aftastur er Vágs Klubbi við ongum stigi. Her skal tó tað fyrivarni takast, at liðið hevur ikki spælt eins nógvar dystir. Bæði oddaliðini hava t.d. spælt 3 dystir, meðan hini hava spælt ávikavist ein og tveir.

Komandi vikuskiftið verður eingin dystur í 1. deild, men fleiri í 2. deild: M2-TK1, HK1-K, KK-TK1 og HK1-M1. Óvist er hvussu verður við Mimir 2 liðnum í aðru deild. Tað fekk ikki mannað liðið síðsta vikuskiftið móti Tvøroyri og helst tekur liðið seg úr kappingini.

1. deild byrjar aftur 11. januar. Tá skal Mimir 1 spæla á Tvøroyri, klaksvíkingar skulu til Vágs og Havnar Klubbi skal niðan á Marinustøðina at royna seg fyri fyrstu ferð. Tað verður ikki minst spennandi at siggja okkara bestu billardspælarar royna seg móti hvørjum øðrum, nevniliga Eirik Nielsen og René Sørensen. Hetta verður helst ársins dystur, nú báðir hava vist framúr gott spæl í teimum fyrstu dystunum. Eisini fer tað at siga okkum nakað um, hvør verður komandi føroyameistari fyri staklingar. Tann kappingin verður í mars mánað komandi ár.

Jólasølustevnan á Kambsdali

ÍF skipar fyri eini jólastevnu í Ítróttarhøllini á Kambsdali komandi vikuskifti. Ikki færri enn 23 ymiskir handlar luttaka við fjøltáttaðum vørum.

Stevnan verður sett friggjadagin tann 7. desember kl. 16.00 av Sigfriði Vørðhamar, bygdaráðsformanni, og verður opin til kl. 22.00.

Leygardagin 8. desember letur stevnan upp kl. 10.00 og heldur fram við alskyns undirhaldi til kl. 22.00. Sunnudagin verður latið upp kl. 15.00 og verður endað kl. 22.00.

Á stevnuni verður mótaframsýning, fevnandi frá innast til uttast hjá bæði monnum, kvinnum og børnum, og verður Rasmus Magnussen frásøgumaður. Jólamenninir hava okkurt gott til tey yngru allar dagar.

Høvi verður at fáa tikið myndir til jólakort og líknandi á stevnuni.

Atgongumerki, vaksin á kr. 30,- og børn kr. 10,-, er samstundis lutaseðil, ið trektur verður á pallinum hvørt kvøld kl. 22.00.

ÍF hevur serstakan bás, har kaffi, te, sodavatn, smyrjibreyð, køkur v.m. fáast til keyps.

Vøruúrvalið fevnir líka frá tí fantasifulla innara til bæði bøkur, hvítvørur, leikutoy, amboð, alskyns klæði, gávulutir og mangt, mangt annað.

Við hesi sølustevnu eru møguleikar skaptir fólki at finna allar jólagávurnar undir einari lon, sigur Ítróttarfelag Fuglafjarðar.

Sí havt aðalfund

2. des. kl. 16.00 var aðalfundurin hjá S.Í. settur. Ikki tann stóra fjøldin var møtt, men avgjørt var at halda fundin hóast alt, tí um boðað varð til nýggjan fund, komu ikki fleiri.

Fyrst greiddi formaðurin frá farna ári og síðani var roknskapurin framlagdur, og so var val av nýggjari nevnd. Uppskot var um at sama nevnd varð sitandi og í tí nevndini sótu Egin Simonsen, form., Andrea Johansen, næstform. Margrið Weihe peningarøkil.

Síðani var ymiskt á skránni og har var uppskot frammi um at fáa undirnevndir til fótbólt, badminton, hondbólt og flogbólt og var hetta góðtikið. Tey, ið vóru á fundinum, fingu hesa uppgávu at taka sær av.

Søkt hevur verið eftir venjara, men bert ein umsókn er komin frá einum dana. Tað hevði verið ynskiligt at fingið fleiri umsóknir. Vit vóna at fleiri koma, tá ið hetta verður lisið.

S.Í. luttekur í vetur í hondbólti og flogbólti og í summar verður luttikið í fótbólti 2. deild, 5. deild og møguliga í 4. deild dreingir, um tað er nóg mikið av teim, smádreingir, piltar og smápiltar og onkur gentulið, kanska kvinnur.

TB týðandi stig frá NSÍ

Munurin á liðunum var ikki so øgiligur, men kortini fingu gestirnir munin við trimum málum, tá dysturin var av.

Talan er um kvinnudystin í 1. deild sunnudagin millum NSÍ og TB í Runavík.

Í fjør var NSÍ næstbesta liðið í deildini, og vísti liðið millum annað hetta við at vinna seinasta dystin móti FM-vinnaranum Neistanum.

Men í ár er annað lag, og ikki hevur gingið so væl hjá liðnum úr Runavík.

Fleiri dystir eru taptir, og varð dysturin sunnudagin ein av hesum.

TB-kvinnurnar vóru væl fyri. Tær spældu skjótt.

Serliga var tað tann eini langskjúttin á liðnum, ið gjørdi lívið súrt fyri málverjan hjá NSÍ.

Annars virkaði verjan hjá NSÍ sum heild sera illa í dystinum, og eins væl og sigurin hjá TB var uppiborin, má NSÍ treytaleyst tilskrivað sær sín part av ábyrgdini.

Við hesum sigrinum slapp TB sær úr botninum, meðan NSÍ má ergrað seg yvir ikki at vera komið upp á síðuna av Neistanum á øðrum plássi.

hj.

Støðan 1. deild kvinnur:

	D	V	J	T	Málúrt.	St.
Skála	10	8	1	0	179-121	19
Neistin	9	5	0	4	133- 98	10
VB	9	4	1	4	109- 98	9
Kyndil	9	4	1	4	114-113	9
NSÍ	8	4	0	3	80-106	8
TB	9	3	0	6	89-113	6
Søljan	8	2	1	5	85-114	5
GÍ	8	2	0	6	86-111	4

Støðan 1. deild menn:

	D	V	J	T	Málúrt.	St.
Kyndil	8	8	0	0	219-155	16
Neistin	7	6	0	1	164-129	12
StÍF	9	4	1	4	175-198	9
Stjørnan	8	3	2	3	144-161	8
VÍF	8	3	0	5	172-161	6
KÍF	7	2	1	4	156-171	5
VB	6	1	0	5	112-131	2
H71	7	1	0	6	124-160	2

